


MARKNAÐARDAGUR ÚTI Á TINGANESI 31.05.97

Stórur marknaðardagur úti á Reyni

Skrá fyri marknaðardagin hjá Kiwanis úti á Reyni leygardagin 31. mai

Kl. 10.00 Forsetin bjóðar vælkomin
Jan Christiansen, varaborgarstjóri, setir marknaðardagin
Havnar Hornorkestir spælir
Básarnir lata upp
Kl. 11.00 G.H.M. spælir
Kl. 14.00 Havnar Hornorkestur spælir
Kl. 15.00 Bjargingarroynd við tyrlu í Vágsbotni
Kl. 16.00 G.H.M. spælir
Kl. 17.00 Jónsvein, Birgir og Eivin undirhalda
Kl. 20.30 »Promotion« konsert í Gundadalshøllini
Luttakandi bólkar:Stowncold, Present Past, 200, Life og Hatespeech
Kl. 23.45 Fýrverkarí á Tórsvølli
Kl. 24.00 Gamlamannadansur í Gundadalshøllini. Big Band, »Gággan« og Harmonikutónleikur

Av tiltøkum verða:

Bingjan hjá Tróndi Paturssyni
Fuglafrøðifelagið hevur framsýning í Reynagarði
Framsýning av gomlum myndum í Mettustovu
Tombola, køkubingo, matsøla o.m.a.

Seksæringurin »Greipur«	Bjargingarroynd
Popcorn – Candy floss	Loppumarknaður
Mini Tivoli	Gøtuspælimaður
Síging	Børn í bjargingarbáti
Rørskreiðibreyt í kúlubað	Hoppiborg. Hoppiborg
Blása sápuløðrur	Tekning
Spurnarkapping	

Av tiltøkum verða:

AFS
ALV
Føroya Felag móti krabbameini
Føroya Fuglafrøðifelag

G.H.M.	Giktafelagið
Glottin stuðlafelag	Havnar Hornorkestur
Havnar KFUM skótar	KFUM skótar
Kiwanis Rósan	Kvinnufelagið
Nýrafelagið	Reyði Krossur
Sankta Jørunds Gildi	Skótalið SSB's
SSB Rovaraflokkur	

Leygarmorgunin klokkan 10 fer varaborgarstjórin í Havn, Jan Christiansen at seta fyrsta marknaðardagin í søgu høvuðstaðsins, sum verður hildin úti á Reyni.

Her er ikki talan um ein vanliga marknaðardag við vanligum handlum og fyritøkum.

Talan er harafturímóti um tiltøk, sum fleiri av teimum nógvu virknu áhuga- og limafeløgunum í Havn skipa fyri.

Hesi feløgini fevna víða - frá G.H.M til Reyða Kross.

Tað er nevndin í hjálparfelagsskapinum Kiwanis, sum hevur tikið stig til tiltakið út frá tí sannføring, at mong av limafeløgunum ov sjáldan hava møguleika at gera vart við seg - har almenningurin er savnaður.

Hesi feløgini, sum umboða eitt stórt tal av fólki, hava hvør í sær týðandi uppgávur , og hetta er tí ein roynd at gera feløgini og teirra arbeiði meira sjónligt.

Lagt er upp til at gera nakað, sum líkist eini stevnu, har tað verður nógv ymiskt til gaman og álvara.

Serliga verður hugsað um børnini. Har verða øll møgulig spøl.

Men aftur til setanina. Tá forsetin í Kiwanis, Áslak Jacobsen og Jan Christiansen frá býráðnum hava boðið vælkomin og sett marknaðardagin fer Havnar Hornorkestur at spæla. Síðani lata teir mongu og fjølbroyttu básarnir upp. Hesir eru ymsa staðni á Reyni.

(Sí annars skrá og kort)

Meðan feløgini sjálvi fáa ágóðan av allari søluni, so fer atgongugjaldið uppá 20 kr. til Kiwanis, sum aftur letur pengarnar til okkurt vælgerandi endamál, sum í høvuðsheitum fevnir um børn.

Hyggja vit eftir skránni fyri hesa „Miniólavsøku", so síggja vit, at har er eitthvørt fyri allar aldursbólkar.

Bjargingarroynd við tyrlu verður á vestaru vág. Jónsvein, Birgir og Eivin fara at undirhalda á tí stóra pallinum úti á Bakka, stór konsert verður í Gundadalshøllini, fýrverkarí verður á Tórsvølli og endað verður við gamlamannadansi í høllini.

SIEMENS KOMFÝRUR

Siemens komfýrur HS 53422

- Glaskeramisk kókisektión
- 4 snarkóki "plátur", harav 1 við møguleika fyri viðkan

Universalur ovnur við 4 ovnfunktiónum:
- Yvir/undirhiti, heitluft, heitluft/impulsgrill, stór grill
- Barnatrygging
- Støddir: H 85 cm., B 60 cm., D 60 cm.

Vanligur prísur 8.830,-

Kontantprísur 7.950,-

ELDING
SMS tlf. 18662 - 18663 • Saltangará tlf. 48762

ALT TIL SEYMING Á EINUM STAÐ!

Umframt okkara altíð stóra úrval av seymitilfari, hava vit nú aftur á goymslu

Toyið til føroyskar buksur
150 cm br., fyri kr. 175,- pr/m

Sum nakað nýtt hava vit nú eisini
Toy til føroyskt skjúrt
130 cm br.

Til kvinnur og gentur hava vit
Stykkir til bryst og floyalselastikk til belti
í trimum breiddum, 3, 4 og 5 cm br.

Eisini hava vit Stálknapparnar til tær føroysku troyggjurnar í tveimum støddum

Eisini hava vit beint nú fingið nógv nýtt toy til summarið

OPIÐ ER:
Mánad.–fríggjad. frá kl. 13–17.30
Leygardag frá kl. 10–12

Sp/f MARJUN HEIMÁ
C. Pløyensgøta 4
100 Tórshavn · Tlf. 12531 · Fax 12319
Allir bygdaordrar verða avgreiddir sama dag sum teir eru innkomnir.

BETONG SAGING
Vit saga...
ALLAR SKURÐIR (dýpi 55 cm t.d.: HURÐA-/VINDEYAOP o.a.
EISINI HOL upp til 30 cm/diam, t.d. til rørleiðingar, ventilatión o.a.
Geva fegnir TILBOÐ! – bæði vanl. húsaánarum, virkjum, byggi- og vvs-fyritokum
FØROYA BETONG SAGING v/ Hjaltur Tausen
Postsmoga 67 · Gerðisvegur 620 Runavík
Tlf. 47543 • Fax 48898
Koma um alt landið!

DANNY TRANSPORT
– tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 19192